


**Evald Johannsen rør við Fípuni Føgru, og situr á lærinum í stýriborð:**

## Langt frá føroya-meistarar

Fimmmannaførini hjá dreingjum úr Norðoyggjum, Fípan Fagra og Ritan, hava ligið lið um lið alt kappingárið. Bátarnar hava stóran part av árinum skifts um at enda á fyrsta og øðrum plássi, men seinastu tríggjar róðrarnar hevur Fípan Fagra úr Klaksvík ligið omaná.

Undan ólavsøku er Fípan Fagra trý stig framman fyri Rituna, og liggur tískil væl fyri til at vinna føroyameistaraheitið.

Kortini tekur Evald Johannesen einki fyri givið.

-Hóast vit liggja væl fyri, so eru vit framvegis langt frá føroyameistaraheitinum. Vit hava verið ræðuliga seriøsir í alt ár, og tað fara vit sjálvsagt at halda fram við til ólavsøku, sigur Evald Johannesen

Róðurin á Vestanstevnu var rættiliga tættur, og tá avtornaði endaði Fípan Fagra omaná við hálvari bátslongd. Evald Johannesen fortelur, at seinastu vikuna hevur manningin á Fípuni Føgru dúgliga vant startin, men starturin á Vestanstevnu gekk ikki eftir ætlan.

-Vit fingu ein ringan start, men vit vunnu nógv inn aftur í miðróðrinum. Eina løtuna stríddust Ritan, Sílið og vit um fremsta plássi, men í endaspurtinum vóru bara vit og Ritan eftir. Tað gjørdist øgiliga tætt aftur í dag, og vit eru ótrúliga fegnir um, at vit endaðu omaná, sigur Evald Johannesen.




*Fyri triðju ferð á rað vunnu dreingirnir við Fípuni Føgru róðurin hjá fimmmannaførunum, og liggja teir sostatt best fyri at vinna føroyameistaraheitið*

*Mynd: Álvur*

# Fípan Fagra liggur best fyri

**Fípan Fagra og Ritan kappast framvegis um føroyameistaraheitið hjá fimmmannaførum við dreingjum. Undan Ólavsøkuróðrinum liggur Fípan Fagra tó betur fyri í kappingini**

5-MANNAFØR DREINGIR

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Tá kappingarárið byrjaði vóru tað tríggir bátar, sum einamest kappaðust um fyrstaplássið í róðrinum hjá fimmmannaførum við dreingjum. Ritan, Sílið og Fípan Fagra. Ritan vann norðoyastevnuróðurin og á jóansøku, meðan Sílið vann á sundalagnum. Hesar tríggjar róðrarnar varð Fípan Fagra næstur á mál hvørjaferð, men síðani hava dreingirnir úr Klaksvík veruliga tikið dyk á seg og hava vunnið tríggjar róðrar á rað. Teir liggja sostatt undan Ólavsøku best fyri í kappingini um føroyameistaraheitið.

Á vestanstevnu kappaðust hesir tríggir bátarnir aftur um oddin í róðrinum. Ritan og Sílið byrjaðu betur enn Fípan Fagra, og eina løtu lá Sílið á odda. Fípan Fagra legði seg tó á odda, tá hálvur teinur var rógvin og fór fyrst um málið knappliga eitt sekund framman fyri Rituna. Teimum á baki komu so Ritan og Sílið.

Fípan Fagra er nú trý stig framman fyri kappingarneytarnar norðan úr Norðdepli og Hvannasundi. Tað vil siga, at Ritan skal vinna Ólavsøkuróðurin og Fípan Fagra skal gerast nummar trý fyri at missa føroyameistaraheitið. Tá verða norðoyabátarnir báðir javnir í stigum, og reglurnar siga, at báturin, sum vinnur Ólavsøkuróðurin vinnur føroyameistaraheitið, tá tveir bátar gerast javnir í stigum.

### 5 mannafør dreingir

1 Fípan Fagra 04:51.22
2 Ritan 04:52.02
3 Sílið 04:59.01
4 Blikur 05:00.06
5 Drekin 05:02.21
6 Tjaldrið 05:08.24
7 Dúgvan 05:24.20 1G
8 Tekla 05:26.15

*Onki er avgjørt í dreingjaróðrinum undan seinasta róðrinum á Ólavsøku, men Fípan Fagra skal bara halda seg framman fyri Rituna tann seinasta róðurin fyri at tryggja sær føroyameistaraheitið*

*Mynd: Álvur*





